Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Smærugøta 9A,
FR-100 Tórshavn.Tlf.316973. Fax 318516. fsn@fsn.fo www.fsn.fo

Sent fyrstu ferð Tórshavn tann 2020 01 08

Tórshavn tann 2020 09 30

Frá

Føroya Skipara -& Navigatørfelag

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin)
(Hækkan av arbeiðsloysisstuðli og eftirløn av arbeiðsloysisstuðli)

Føroya Skipara -& Navigatørfelag hevur hesar viðmerkingar til nevnda uppskot til broyting av ALS – lógini.

1. *Í kunngerð nr. 136 frá 3. november 2009 um ALS-gjald, sum broytt við kunngerð nr. 165 frá 20. desember 2011, verður í § 1 "1,25%" broytt til: "1%".*
   Hetta tekur FSN sum útgangspunkt undir við, men vit mæla til, at vísa varsemið við at lækkað inngjaldið, tí skjótt kunna tíðir broytast til tað verra, og tá kann verða trupult, at hækka eitt ingjald aftur, tá hava fólk helst minni/færri pengar um hendi.

2. ***Til** § 16, stk. 1, 1. pkt. verður "75%" broytt til: "80%".*
   Hetta tekur FSN sum útgangspunkt undir við, men nevndi % parturin má fyri sjófólk roknast av aðrari upphædd enn fyri starvsfólk á landið. FSN hevur víst á við lessarabrævið, at sjómaðurin kundi verði avroknaður av eini MINSTULØN sum í dag er kr. 1100,- pr/mynstraðan dag, og hetta talið kr. 1100,- skuldi verði falda við alt eftir hvat starv viðkomandi persónur er mynstraður eftir, tí navigatørarnir fáa eitt nú t.d. 25-50 og 100% eyka í hýru, og teir gjalda av allari A-Inntøkuni til ALS. Sjálvandi pluss lógarkravda pensjón.

3. *§ 16, stk. 2, 1. pkt. verður "kr. 210.000" broytt til: "kr. 222.000 umframt eftirlønargjaldið sbrt. § 17"*
   Hetta tekur FSN sum útgangspunkt undir við, men upphæddirnar muga tillagast sum víst í §16 stk1,1. Pnkt At sami formil verður brúktur við mynstuløninni fyri sjófólk sum útgangspunkt. Mynstuløn er í dag kr. 1100,- pr/ mynstraðan /dag. Og

falda við 25-50 og 100% eyka, grunda á alt eftir hvat starvið sum mynstra verður eftir.

4. **Til *§ 17** Arbeiðsleys, sum fáa arbeiðsloysisstuðul, rinda eftirlønargjald sbrt. eftirlønarlógini.”* Hetta tekur FSN undir við.

5. FSN malir til, at §20 a verður endurskoða.

Har tað stendur: *eftir 30 dagar, frá tí at skipið varð lagt.* Skal broytast til frá 1. degið skipið var lagt, verður goldið til og við dagin fyri sum mynstra verður aftur við viðkomandi skipið, og hetta er galdandi fyri tað skipið ” makkaran”sum mátti liggja, meðan hitt skipið lág til umvælingar.

Har tað stendur: *Fyri hvørjar kr. 1.000,-, sum útrokningargrundarlagið hjá fiskimanninum fer upp um upphæddina, nevnda í § 16, stk. 2, minkar útgjaldið við 0,5 prosentstigum.* **FSN biður um, at hetta verður strika, tí hetta er diskriminering av einum bólki. Her hugsað vit um § 266b**

§ 20 a. [2)] Fyri fiskimenn, sum eru við fiskiskipum, sum hava veiðiloyvi sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, og sum verða løgd vegna umvælingar, verður arbeiðsloysisstuðul goldin eftir 30 dagar, frá tí at skipið varð lagt, hóast setanarliga tilknýtið millum fiskimannin og reiðaríið ikki er av. Goldið verður í mesta lagi fyri 60 útgjaldsdagar. Fyri hvørjar kr. 1.000,-, sum útrokningargrundarlagið hjá fiskimanninum fer upp um upphæddina, nevnda í § 16, stk. 2, minkar útgjaldið við 0,5 prosentstigum.

Stk. 2. [2)] Um stýrið tekur undir við ásetingunum, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð, hvørjir fiskimenn koma undir hesa reglu, og undir hvørjum treytum, hvørjar umvælingar talan skal vera um, útgjald, herundir útgjaldsdagar, útgjaldskeið, og um skipanina annars, herundir hvørjar upplýsingar skulu gevast Arbeiðsloysisskipanini, hvør skal vátta hesar upplýsingar, nær og hvussu tær verða latnar, og ásetan av freist fyri at lata hesar upplýsingar o. l.

Vegna
Føroya Skipara-& Navigatørfelag
Annfinnur Garðalíð
Formaður